# Reglugerð

## Stuðul til feløg og tiltøk í Vágs kommunu

**Stuðul til ítróttarfeløg og bólkar**

- Felagið skal vera skrásett í kommununi.
- Felagið skal verða virki.
- Stuðulin kann hækkast til feløg sum hava miðvíst lokalt ungdómsarbeiðið.
- Roknskapur skal fyriliggja fyri stuðul yvir 25.000,00 kr.
- Stuðulin verður bert veittur eftir skrivligari umsókn.
- Gjøldini verða ásett árliga í mun til fíggjarætlanina hjá Vágs kommunu.

**Stuðul til tiltøk**

- Kommunan kann veita stuðul til ávís tiltøk, sum hava týdning fyri kommununa
- Stuðulin er treytaður av at ein roknskapur verður gjørdur fyri tiltakið. Kommunan kann treyta sær, at tiltakið er framt áðrenn stuðulin verður goldin út.

**Stuðul til einstaklingar**

- í samb. við 100 ára føðingardagar hjá privatpersónum rindar kommunan fyri mat, høli og fólk til matger.
- Næmingaferðir, kommunan kann lata stuðul til næmingaferðir fyri næmingar úr Vágs kommunu.

**Stuðul til landsfeløg**

- Kommunan kann stuðla feløgum uttanfyri kommununa.
- Kommunan kann stuðla einstøkum prosjektum, sum hava týdning fyri borgarar í kommununi og eru tíðaravmarkað. Treytin er at ein fíggjarætlan er og at tiltakið hevur ein roknskap tá tað er liðugt. Stuðulin kann vera treytaður av at prosjektið er framt.

**Mannagongdir**

- Stuðul undir 20.000,00 kr. verður beinleiðis játtaður og avgreiddur av Mentunarnevndini.
- Stuðul yvir 20.000,00 kr. verður avgreiddur av Fíggjarnevndini eftir tilmæli frá Mentunarnevndini.
- Stuðul yvir 50.000,00 kr. verður avgreiddur av Býráðnum, eftir tilmæli frá Fíggjarnevndini og Mentunarnevndini.

Hendan Reglugerð er góðkend á býráðsfundi tann: 16. mai 2011